# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dagur: 16.september<br>Tíð:kl 16.00 – 17.30 | | Luttakarar: Allan, Vivian, Súsanna, Rudi, Bjørghild, Bergun og Marjun<br><br>Ikki møtt: | |
| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
| 1. | 1. Fundarfrásøgnin | | |
| 2 | 2. Skúlabyrjan og gerandisdagurin við corona støðuni. | Skúlabyrjan 18 aug. var eitt sindur skerd við bert 1 – 5.fl<br>Tey eru býtt í floksstig og deildir, so vanliga handverk og list og ítróttur kann virka sum vanligt.<br>Valskipan í 6. flog 7.fl er niðurlagt og fastir bólkar ístaðin.<br>Viku seinni byrjaðu 6. – 9.fl.<br>Ferðingin er ein spurningur sum ofta er uppi at venda, men reglurnar eru tær somu 1.test neg. og síðan aftur 6.dag. Annars brúka vit og skil, í mun til hvar ein hevur verið.<br>Foreldrafundir í miðrók við frástøðu.<br>Møguleiki er ikki fyri at savnast í størru hópum til felags tiltøk í Miðrókini. | MH |
| 3. | 3. Umvælingar av skúlanum | *Umvælingar av hurðum*: allar brunahurðar skiftar.<br><br>*Umvælingar av vindeygum*, vindeygu niðri við jørð verða skift, bert uttara vindeygað.<br><br>Motorar, sum virka fyri at vindeguni fara upp og aftur,virka illa tí skulu teir eisini skiftast nógvastaðni.<br><br>*Umvælingar av taki*, ábøtur á skaðar sum eru. Umframt verður gjørd nýggj av vatning.<br>Framhaldandi sama slag av dúki.<br><br>*Umvælingar av skaðum á gólvið*, máttir verða skornar niður í gólvið framman fyri brunahurðar har skaði er.<br><br>*Umvælingar av klædningi* , hann skal skiftast á norður-, suður og vestursíðuni.Í samband við hetta skal stillads setast upp.<br>Articon tryggjar arbeiðsplássið. | MH |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | Tíðaætlanin heldur ikki, vegna korona. | |
| 4. | 4. Skúlastýrisval | Tilfarið til skúlastýrisvalið er ikki komið út enn, men hetta er vanliga gongdin.<br>Kunning í oktober, skúlin ger ein vallista við øllum foreldrum. Listin liggur frammi á skrivstovuni at eftirkanningar hjá foreldrum.<br>Uppstilligarfundur skal í seinasta lagi hava verið 27.okt. og listin við valevnum klárur 3.nov.<br>Valið er 10.november, í Látrinum. | MH |
| 5 | 5. Umsókn til skúlagarð | Marjun hevur sent eina umsókn inn um at fáa skúlagarðin gjørdan á vestursíðuni.<br><br>Hetta mál hevur fingið nógva og drúgva umrøðu í fleiri ár.<br><br>Niðurstøðan er nú, at kalla inn til fundar aftur 7.okt.<br><br>Tekniska nevd varaði av økinum vestanfyri og tí eru ráðini at kalla inn Boga Jacobsen frá umsitingini og Jákup Dam sum tað politiska umboðið. | MH |
| 6 | 6. Kunning | Rennindagurin hevur verið skipaður eftir floksstigum í ár vegna korona.<br><br>Tøknilig fatan hevur verið stóra undirtøku.<br><br>Skýlið til prutlini er um at verða liðugt. Næmingaráðið hevur havt hetta ynskið og skúlin ber kostnaðin, so hetta mál kundi síggjast rímiliga skjótt aftur<br><br>Talvurnar á skúlanum ganga á sítt tíggjunda ár og eru nú í vánaligum standi.<br><br>Grunddeildin hevur øll skift til nýggjar skermar, næst er at vit skifta talvurnar á hádeild við white board, knýtt at eini teldu, kanón og soundbar. | MH |
| 7 | 7. Ymiskt | Allan stillar ikki upp aftur til komandi skúlastýrið<br><br>Vivian stillar ikki upp, tí hon heldur tað er tungt at arbeiða við málum í skúlastýrinum, bæði- uttan og innanhýsis.<br><br>Mál taka langa tíð og í førum als ikki loyst. | |